# Sterkari euro aftur – Ódugnalig arbeiðskraft í USA, og Toyota fór til Canada

**So hevur euran aftur nakað somu styrki í mun til dollar, sum fyri gott tveimum mánaðum síðani. Tað var tá alt rokið var um Frankaríki og Holland, sum atkvøddu ímóti traktatini um nýggja europeiska grundlóg.**

EURO/DOLLAR OG ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Tá bleiv fokuserað uppá góðu búskaparligu tølini úr USA, meðan euro-økið var snávað í politiskari óvissu. Nú hevur friður verið um tann politiska partin í longri tíð, og tað vísir seg sum at londini geva sær góðar stundir at sodna politisku støðuna, og at kanna møguleikarnar.

Fyri fyrstu ferð í langa tíð kennist sum, at euro-londini og felags gjaldoyrað - euran - aftur verða mett eftir búskaparligari alin, og at gongdin í USA í so máta hevur minni at siga.

Góð og sterk tøl eru komin úr USA, men tey hava ikki havt stórvegis ávirkan á dollaran. Týsdag væntast miðbankin, The Fed, at hækka rentuna enn einaferð við 0,25% til 3,50%, men kursurin hevur enn ikki verið ávirkaður av hesum

### Aftur til fokus á "twin deficits"

Seinasta fríggjadag komu tøl, sum vístu hvussu nógv nýggj arbeiðspláss vóru skrásett í USA í juli. Tað komu nógv fleiri enn væntað, í alt 207.000. Men hesaferð hevði tað onga positiva ávirkan á dollaran.

Heldur eru tað strukturellu problemini, "the twin deficits", sum eru hall í handli og landshúsarhaldi, sum aftur fara at tyngja dollaran. Komandi fríggjadag síggja vit so nýggj hagtøli um uttanlandahandilin. Hvussu stórt verður hallið hesaferð, hvussu fer tað at ávirka dollaran?

Í síðstu viku vístu tøl í Europa, at service-vinnan var í góðari framgongd, og tað bleiv tikið sum eitt positivt tekin. Hetta gav euruni eitt skump upp eftir.

ECB, europeiski miðbankin, hevur eisini sagt frá, at bæði tey oljuframleiðandi londini í OPEC og í fyrrverandi Sovjet, nú eru farin at brúka fleiri oljupengar í Europa. Tí verða olju-dollars vekslaðir til euros. Russland er haraftrat farið at leggja fleiri euros í eina "valuta-kurv" sum verður brúkt til at dagligar transaktiónir. Dollarparturin er fallin frá 65% til 60% í hesi kurv.

### Væntar framhaldandi uppgongd fyri euro

Gitingar um framtíðarstøðuna eru aldri serliga eftirfarandi, men tær siga kanska nakað um, hvussu ekspertar og stovnar meta støðuna og ráðandi faktorarnar beint nú. Eitt firma, Merrill Lynch, metir at dollar/euro lutfallið við ársenda ferð at liggja um 1,32 dollar fyri eina euro. Um so verður, so fer euran at hava vunnið at kalla alt tað inn aftur, sum hon hevur mist ella tapt í ár.

### Toyota valdi Canada fram um USA

Hvørki útbúgvingarskipanin og sosiala skipanin í USA líkist teim vestur-europeisku, enn minni vælferðarskipanunum í Norðurlundum sum Danmark ella Svøríki. Í USA er alt nógv meira privatiserað. Vælferðarmodellið í Europa leggur dent á, at eitt nú alt tað elementera í útbúgvingarsysteminum og heilsuskipanini verður rikið solidariskt av tí almenna.

Í USA er ein politiskur lærusetningur, at tey ríku skulu ikki gjalda ov nógv í skatti. Bush forseti hevur hildi fram í hesi foyru, og hevur givið teim ríku skattalætta, sum bert er komin 1% av fólkinum til góðar. Men eingin í vinnulívinum torir rættiliga at pilka við hetta djúpt konservativa dogmið.

Tí eru tær almennu service-skipaninar har út av lagi vánaligar, tí skattainntøkurnar hjá tí almenna eru ov lágar til at reka effektivar og vælvirkandi tænastur. So er tað eisini tað, at útreiðslurnar til militerið, herin, flogvápnið og flotan tekur bróðurpartin av øllum skattainntøkunum.

### Arbeiðskraftin er bílig í suðurstatunum, men…?

Einaferð lá USA klárt á odda tá tað ráddi um at designa og framleiða bilar. Men tær størstu fabrikkirnar, Ford og General Motors eru í kreppu. Partabrøvini eru nú klassaði sum "junk."

Japanska Toyota hevur harafturímóti framgongd. Paul Krugmann frá New York Times (endurgivið í Politiken) hevur skrivað um hendingarnar.

Tá Toyota herfyri skuldu velja øki til eina spildurnýggja fabrikk, buðu fleiri av suður-statunum seg til. Teir bjóðaðu í fleiri førum nógvar hundrað milliónir sum "agn."

Í juli fall so avgerðin. Tann nýggja fabrikkin kom slettis ikki at liggja í USA men í Ontario í Canada. Toyotakoncernin forkláraði hesa avger og segði, at teir ikki kundu taka við millióna-tilboðum úr amerikansku suður-statunum, men løgdu dent á at arbeiðskraftin í Canada hevði nógv hægri kvalitet.




### Nógvir amerikanarar eru veruliga analfabetar

Útbúgvingarstøðið í sunnaru statunum í USA er so vánaligt, at arbeiðsfólkið ofta ikki dugir at lesa ein vanligan skrivaðan tekst. Toyota hevur longu fleiri fabrikkir í USA, eitt nú í Alabama. Japansku vinnulívsfólkini eru satt at siga bilsin um tað vánaligu útbúgving, sum nógvir "vanligir" amerikanarar hava. Har hevur verið neyðugt at geva arbeiðsfólkinum arbeiðspapírini, ikki sum tekst, men sum tekniseriur, so at analfabetarnir høvdu okkurt at miða seg eftir.

Guvernørurin í Alabama hevði annars fyri tveimum árum síðani lagt uppskot fram um ábøtur í skúlanum. Men tað hevði kostað skattapengar. Bleiv uppskotið viðtikið, høvdu tey ríkastu sloppið at goldið eitt sindur meira í skatti. Tí skipaðu tey fyri herferð móti skúlauppskotinum. Argumentið var, at hægri skattur fór at kosta arbeiðspláss. Uppskotið var felt. Og teir fingu onga Toyotafabrikk.

Canada hevur eina sjúkatryggingarskipan sum líkist tí Vestur-europeisku, meðan tann í USA er skipað sum privatar tryggingar.

Toyota legði eisini dent á í grundgevingini fyri at velja Canada fram um USA, at Canada hevur eina nógv betri sjúkratryggingarskipan enn USA. Í USA skulu arbeiðsgevarar umframt lønina eisini gjalda sjúkratrygging. Canadiska skipanin er sum heild nógv bíligari og effektivari enn tann í USA, sum hevur stórar umsitingaligar útreiðslur at dragast við. Tann canadiska kostar minni uppá íbúgvan.

USA missir arbeiðspláss, færri arbeiðandi hava ein arbeiðsgevara, sum betalir sjúkratryggingina, og fleiri enda á "Medicaid", sum er ein "olmussu-skipa" hjá teimum minst mentu og arbeiðsleysu.

### Globalisering, "flatan skatt" og vælferð?

Tað verður javnan ført fram, at globaliseringin fer at taka støðið undan vælferðarsamfelagnum. Høgt skattastøði og góð sjúkratrygging ikki sampakkar við kappingarføri.

Eisini í Føroyum hava verið røddir frammi, sum hava skotið upp, at vit brúka ein sonevndan "flatan skatt" uppá 13%. Hevði verið funnin fressur hjá teimum allarríkastu, men vánaligt fyri fólkið sum heild og fyri samfelagið. Spurningurin er um "kittið" í samfelagnum kann halda til sovorið ósolidariskt lærubókamøsn.

Bílig arbeiðskraft kann ikki brúkast í øllum førum. Tað at arbeiða í einari háteknologiskari framleiðslu krevur ikki bert lesikunnleika, men eina høga almenna útbúgving. Í USA er tað eitt privilegium at hava eina grundleggjandi sjúkratrygging. Í Canada er tað ein borgararættur. Í hesum føri flytir tann nýggi bilídnaðurin frá USA til Canada.

> *"Arbeiðsfólkið í amerikanskui suðurstatunum hevur so vánaliga útbúgving, at neyðugt er hjá Toyota at brúka tekniseriur í upplæringini av teim arbeiðandi."*
>
> *Paul Krugmann, New York Times*